


*Heimsins mest eftirlýsti maður varð mánanáttina skotin í Pakistan. Við atsóknini fekk USA loksins hevnd fyri yvirgangsatsóknina í New York 11. september 2001*

í einum bygningi, ið var meinlíkur bygninginum, teir skuldu loypa á, og umsíðir fóru 24 mans úr Afganistan í tveimum Black Hawk-tyrlum inn um markið til Pakistan at taka ella gera av við ringasta fíggindan hjá USA.

Mangan verður sagt, at veruleikin kann vera ótrúligari enn teir filmar, sum royna at lýsa veruleikan á stórslignan hátt. Hetta varð sagt, tá tornini í New York fullu til jarðar fyri 10 árum síðan. Soleiðis var eisini, tá amerikanarar skutu bin Laden sum hevnd fyri atsóknirnar í New York. Í einum kjallara undir Hvítu Húsunum sótu Barack Obama og Hillary Clinton saman við sínum ráðgevum og fylgdu við atsóknini, meðan hon varð framd. Hillary Clinton tóktist mestsum skelkað, og Barack Obama líktist einum, sum hugsaði, at miseydnaðist atsóknin, var hann fokin sum forseti.

## Sum í James Bond

Barack Obama hevði allar góðar grundir til at hugsa júst hetta. Í 1979 royndi Jimmy Carter at bjarga nøkrum amerikonskum gíðslum í Iran, men atsóknin miseydnaðist fullkomiliga. Miseydnaða atsóknin setti bæði USA og Carter í sera ringt ljós og var ein orsøkin til, at Ronald Reagan vann lættliga á forsetavalinum beint aftaná. Skuldi tað eydnast Obama at fella bin Laden og á tann hátt prógva, at hann er ein harður hálsur, ið torir at taka avgerðir, ið byggja á eina rætta kenslu í maganum heldur enn fullvissu í høvdinum? Tað eydnaðist nógv betur, enn hann hevði ímyndað sær.

Frásagnirnar um, hvussu servandu hermenninir drupu Osama bin Laden, eru sum tiknar úr einum James Bond-filmi. Sambært miðlunum greiddi stjórin í CIA, Leon Panetta, Obama og hinum frá, hvat hendi undir atsóknini. »Teir eru komnir fram,« segði hann einaferð, og minuttirnir gingu. So upplýsti hann, at hermenninir høvdu sæð Geronimo. Soleiðis kallaði CIA Osama bin Laden. Nú gingu 40 minuttir, áðrenn boð komu um, at fíggindin var fallin í bardaga. Kvirt var í rúminum eitt lítið bil, og so segði Obama: »Vit fingu hann!« Tá kundu øll fegnast um søguligu hendingina.

Ikki fyrr enn tveir tímar seinni fekk Barack Obama endaliga prógvið um, at talan var um Osama bin Laden. Hermenninir tóku mynd av yvirgangsmanninum, sum á teldu varð samanborin við aðrar myndir av honum, og myndirnar samsvaraðu. Kona bin Laden váttaði eisini, at talan var um Osama. Fýra tímar seinni helt Barack Obama sína røðu og kunngjørdi fyri USA og øllum heiminum, at amerikanarar høvdu gjørt av við bin Laden. DNA-kanningar hava seinni staðfest við 99,9 prosent vissu, at talan var um Osama bin Laden, ið amerikanarar nú siga seg hava søkt í havið.

## Skrásetti sínar hermenn

Maðurin, ið varð søktur í havið, gjørdist heilagur krígsmaður longu í 1979, tá Sovjetsamveldið leyp á Afganistan. Tá legði hann sum einans 22 ára gamal upp í bardagan ímóti teimum vantrúgvandi russarunum. Hann stóð á odda fyri at samskipa eina altjóða herdeild við 20.000 muslimskum jihadistum, heilagum krígsmonnum. Tá russararnir tóku seg úr Afganistan í 1989, skrásetti hann allar krígsmenninar í eini teldugoymslu, so hann kundi heita á teir um at kríggjast aðrastaðni, gjørdist hetta neyðugt. Hetta var byrjanin til Al-Qaida.

Í 90'unum vóru hermenn hjá Al-Qaida virknir bæði í Kekenia, Bosnia og Kosovo. Tá Flógvakríggið brast á í 1991, lýsti bin Laden kríggj ímóti USA, tí amerikanarar vóru komnir á saudiarabiska jørð, har heilagu staðirnir Mekka og Medina eru. Høvuðsstøð sína flutti hann til Sudan í Afrika, haðani hann samskipaði síni álop á USA. Eitt nú royndi Al-Qaida at sprongja World Trade Center í luftina í 1993. Í 1996 kom Taliban-rørslan til valdið í Afganistan, og tá fekk bin Laden skjól har. Einar 300 milliónir dollarar átti hann, so hann fíggjaði sjálvur sítt yvirgangsvirksemi.

Í 1998 bumbaði Al-Qaida amerikonsku sendistovurnar í Kenya og Tansania, og hundraðtals fólk lótu lív. Í 2000 søkti felagsskapurin at herskipinum USS Cole í Jemen, og 17 amerikanskir hermenn lótu lív. Og tann 11. september í 2001 framdi Osama bin Laden eina so stórsligna yvirgangsatsókn ímóti USA, sum ongin nakrantíð áður hevði framt. Amerikanarar vóru skelkaðir, ja, summir ræðslusligni. George Bush, forseti, sendi tunga skjútsið bæði inn í Afganistan og Irak at finna teir seku, og amerikanarar funnu nógvar sekar, men ikki tann týdningarmiklasta, Osama bin Laden.

Mánanáttina skutu teir hann so, og nú veit Osama bin Laden, um hann hitti 20 jomfrúir í himmiríki sum tøkk fyri yvirgangin, ið skapti so stóra sorg kring heimin.